SOSIALURIN

Útgevari:
FØROYA JAVNAÐARFLOKKUR

Blaðstj.:
Villi Sørensen.

Box 76.

Prentsmiðjan á Heygsbreyt
TELF 1820

Hvat er vunnið í Grønlandi?

Týsdagin legði løgmaður rúgvusmikið álit fram á ting ella frágreiðing frá, hvussu lá við Grønlandsmálinum.

Teir menn, flokkar og bløð, sum í seinastuni hava lagt árar um borð fyri at villa fólk og billa tí inn, at stjórnarflokkarnir hava einki vunnið í Grønlandsmálinum, men svikið stór liga, sita nú hánir, snópnir og bíta seg í vørrina, tí eingin maður av minsta samføri kann annað enn ásanna, at sendinevndin, sum hevur verið í Grønlandi, er komin heimaftur við einum glæsiligum úrsliti.

Hetta úrslitið er áður nomið við her, men vísandi til nevndarálitið, ið liggur á tingborði, verður tikið uppaftur:

Vunnar eru 6 nýggjar havnir, harí minst 15 og í summum 20 bátar kunnu rógva út frá hvørjari. Altso yvir 100 bátar.

Hesar havnir eru fingnar treytaleysar. Menn kunnu nýta tær, sum teir vilja, og eru ikki bundnir av t. d. avreiðing til KGH ella av øðrum treytum.

Vit hava sostatt 8 havnir, tá ið vit taka Føroyingahavnina og Ravns Stóroy við at rógva út frá í Vesturgrønlandi.

Vit hava rætt til at avreiða til flakavirkini, um hesi kunnu geva kappingarføran prís, men onga skyldu at gera tað. Vit standa fullkomuliga óheftir.

Av álitinum sæst, at KGH vil royna at geva arbeiðskor og fiskapris, ið fiskimenn halda vera nóg góð, at teir standa seg við at lata fisk sín til grønlendsk flakavirki, tá ið tað liggur best fyri.

Grønlandsráðið hevur saman við sendinevndini úttalað, at tað er mál Grønlendinga og Føroyinga at gera burturúr rikidóminum í Grønlandi.

Henda erklering og hesar vunnu havnir og avreiðingarættindi til grønlendsk flakavirki merkja eitt ásýnligt systemkifti í grønlandspolitikkinum.

Stongilin, ið fyrr hevur hildið Føroyingar úti, er nú í stórum muni brotnaður. Hurðarnar, ið fyrr vóru læstar, eru nú í munandi forum opnaðar fyri Føroyingum í Grønlandi.

Arbeiðsøkið hjá Føroyingum er við hesum sigri í grønlandspolitikkinum stórliga økt.

Og í Eysturgrønlandi er nú av sendinevndarinnar ávum, greiða kom in á, hvar ið Føroyingar kunnu, veiða, og har er veiðuøkið frá norðara armi av Lindenowfjørðinum og heilt norður ígjognum, við undantaki av einum petti av Angmagsalik økinum, eitt petti, ið røkkur frá Dannebrogsoynni í suðuri til oyggj Eiriks Reyða í norðri.

— — —

Hetta er glæsiligasta úrslit, spell bara, at ísur og óveður hevur spilt allan fiskiskapin í Grønlandi í ár. Men veður og vindur skifta allastaðni.

Gott ár kemur aftaná ringt.

Heilt við síðuna av

Aftaná Ólavsøkutingsetuna skriv aði Dagblaðið 14. august 1959, at eitt tingmál var avgreitt, nevnliga 280.000 kr. til skúlabygging í Fuglafirði. Í somu grein verður um tunnellina millum Tvøroyri og Hvalba, sum eitt av teimum mongu málum, sum ikki vóru avgreidd. — Nú hendir tað, at løgtingslóg viðvíkjandi tunnel millum Tvøroyri og Hvalba verður lýst í Dimmalætting 26. august 1959. Lógin viðv. skúlabygging í Fuglafirði verður lýst 2. sept. 1959. Eftir hesum at doma er ikki eitt mál avgreitt, men tvey. — Ein kann hugsa, at tá eitt mál er samtykt og alment lýst sum løgtingslóg, at tað er liðugt frá løgtinginum. Men so heldur Dagblaðið ikki, tað heldur áfram at skriva, at uppskot um gerð av tunnellini má á ting *at samtykkjast*. Er hetta ikki heilt við síðuna av? Tí tunnellin er samtykt á Føroya løgtingi, og løgtingslógin er alment lýst viðv. henni. Dagblaðið hevur ikki talað eitt orð um hesa lýstu løgtingslóg. Lógin er lýst, og eftir øllum galdandi reglum kann ikki landsstýrið sleppa undan tí, sum ein lýst løgtingslóg áleggur. Landsstýrið og fíggjarnevnd løgtingsins hava í næstseinastu viku viðgjørt málið um gerð av tunnellini millum Tvøroyri og Hvalba næsta ár. Hetta vóru gleðilig tíðindi, og tøkk skulu tit hava fyri hetta megnar og lívsneyðuga tiltak. Verkfrøðingar eru longu í ferð við at gera detailprojektið.

Hugnaligt var eisini at siggja, at verkfrøðingarnir góðu sitt besta viðmæli, at tunnellin bæði var fíggjarliga og verkaliga forsvarlig.

Tann 17. apríl skein Dagblaðið eins og eitt glansbílæt av skaðafroi og skrivaði, at fíggjarnevndin hevði misálit á løgmanni viðv. tunnellini. Men 16. september 1959, tá løgmaður saman við hinum landsstýrismonnunum og fíggjarnevndini samtyktu at læna pening til og gerð av tunnellini. Nú kemur Dagblaðið 18. sept. 1959 við einum hjartasuffi, eins og tað skuldi fingið hjartafeil, tað er ikki undarligt. Tí Norðstreym oyingar góvu Dagblaðnum ein slíkan kvøkk 8. nov. 1958 við valið, at tað var um at dána. Tað er tó so frægt, at tað hevist at teim monnum, ið vilja fremja Suðuroyar tunnellina og Borðoyar tunnellina, serliga hes ar tunnellirnar hevur tað ligið úti eftir at kova.

Tað spyr, hví tóku tit ikki Oyggjarvegin við. Dagblaðið kundi spurt seg sjálvt. Hví tók fólkaflokkurin ikki Oyggjarvegin við og gjørdi hann tey 8 árini, ið hann sat í landsstýrinum? Hann hevði hóvi til tess, og ongin annar; men hann sat við góðum hælkoytum og helt aftur. Hann er potturin og pannan til, at tunnellin í Suðuroy, tunnellin á Borðoy og Oyggjarvegurin ikki eru gjørdir, tí Fólkaflokkurin hevði vegamál um hendi í fyrrv. landsstýri. Men nú P. M. Dam, løgmaður, hevur fingið vegamál um hendi, og tað kovandi afturhaldið hjá Fólkaflokkinum fer at skrædna, leikar Dagblaðið í sum vituligt. Dagblaðsins álop á løgmann, landsstýrið og landstýrisflokk ar í hesum dogum er eins at líkna við hund, sum situr í húslon og goyr út í tóman heim.

Hvalba, tann 21. sept. 1959.

J. O. Schróter.

Lastvognskoyring
við vippu
Telefon 2346
Leivur Johannesen

Setið lýsing tygara
í
SOSIALIN

Haldið Sosialin

STATENS PRÆMIEOBLIGATIONSLÅN af 1954.

10de trækning.

Følgende præmier er udtrukket:

250.000 kr.: serie nr. 2273 løbe-nr. 2653
100.000 kr.: serie nr. 1616 løbe-nr. 2040
serie nr. 2304 løbe-nr. 2245
serie nr. 2702 løbe-nr. 2055
50.000 kr.: serie nr. 1152 løbe-nr. 2431
serie nr. 1160 løbe-nr. 2330
serie nr. 1527 løbe-nr. 2843
serie nr. 1613 løbe-nr. 2066
serie nr. 1970 løbe-nr. 2745

	serie	løbe-nr.	serie	løbe-nr.	serie	løbe-nr.	serie	løbe-nr.	serie	løbe-nr.	serie	løbe-nr.	serie	løbe-nr.
25.000 kr.:	1005	2024	1145	2097	1607	2871	2244	2386	2258	2770	2741	2086	2840	2298
	1019	2580	1564	2526	2030	2821								
10.000 kr.:	1120	2075	1270	2455	1382	2279	1496	2632	1966	2829	2320	2534	2790	2452
	1182	2729	1281	2208	1466	2552	1779	2449	2028	2787	2415	2529	2948	2885
	1184	2992	1317	2388	1488	2825	1948	2565	2265	2101	2699	2022		
5.000 kr.:	1057	2902	1306	2270	1678	2151	2214	2662	2442	2869	2673	2238	2893	2488
	1140	2910	1323	2510	1697	2608	2235	2187	2468	2848	2691	2465	2925	2059
	1165	2246	1406	2567	1888	2277	2250	2577	2490	2479	2712	2896	2954	2181
	1216	2232	1466	2602	2139	2401	2379	2198	2558	2119	2715	2576	2991	2011
	1241	2855	1591	2079	2164	2223	2363	2789	2571	2193	2741	2018		
	1300	2002	1642	2590	2178	2734	2432	2347	2575	2698	2854	2323		
1.000 kr.:	1407	2172	1580	2645	1764	2336	1911	2524	2235	2008	2444	2164	2725	2488
	1409	2986	1601	2883	1805	2366	1922	2743	2237	2405	2492	2811	2741	2845
serie	løbe-nr.	1470	2328	1619	2895	1806	2092	1971	2094	2237	2642	2511	2847	2768	2716
1109	2065	1477	2072	1659	2617	1828	2788	1998	2835	2247	2008	2518	2031	2778	2427
1142	2544	1489	2513	1671	2991	1852	2028	2014	2692	2253	2807	2522	2975	2789	2032
1192	2746	1492	2486	1675	2667	1854	2975	2018	2462	2289	2776	2547	2345	2832	2245
1246	2046	1503	2038	1681	2691	1863	2867	2023	2305	2311	2572	2598	2610	2863	2955
1269	2116	1533	2285	1682	2439	1865	2610	2090	2906	2315	2003	2602	2141	2867	2817
1313	2131	1534	2254	1685	2174	1876	2544	2160	2545	2318	2161	2615	2493	2873	2415
1340	2283	1547	2833	1722	2608	1883	2503	2142	2152	2324	2930	2686	2738	2883	2142
1350	2852	1551	2011	1726	2339	1880	2162	2184	2095	2338	2072	2705	2197	2942	2553
1358	2521	1567	2790	1743	2065	1907	2987	2202	2451	2338	2997	2712	2793	2980	2262
1399	2989	1573	2107	1750	2367	1910	2606	2209	2894	2422	2475	2714	2014		
500 kr.:		1264	2874	1578	2263	1923	2032	2160	2311	2416	2379	2631	2541	2812	2558
		1308	2067	1600	2175	1951	2960	2166	2409	2435	2765	2649	2037	2829	2451
serie	løbe-nr.	1338	2453	1637	2550	1950	2722	2207	2560	2457	2373	2676	2581	2836	2687
1104	2759	1366	2020	1643	2801	1982	2541	2215	2788	2479	2813	2681	2377	2859	2171
1116	2925	1389	2529	1701	2147	1983	2067	2225	2354	2490	2980	2696	2043	2875	2069
1123	2427	1395	2087	1718	2878	1998	2884	2239	2705	2572	2932	2698	2605	2879	2683
1126	2596	1404	2196	1744	2553	2026	2453	2268	2892	2574	2139	2699	2206	2913	2011
1147	2330	1422	2779	1763	2491	2036	2495	2272	2512	2579	2777	2700	2237	2921	2921
1170	2446	1444	2920	1796	2392	2071	2968	2285	2512	2592	2355	2729	2122	2923	2702
1212	2212	1499	2737	1809	2512	2078	2483	2293	2543	2598	2148	2778	2540	2946	2031
1217	2385	1502	2573	1884	2554	2089	2537	2356	2063	2613	2601	2790	2652	2948	2122
1262	2931	1540	2138	1913	2231	2115	2921	2383	2557	2614	2458	2790	2859	2991	2001
1263	2877	1565	2651	1914	2671	2117	2062	2407	2175	2623	2865	2806	2196		

Samtlige præmieobligationer med løbe-nr. 2628 og løbe-nr. 2863 er udtrukket med gevinst på 100 kr.

Den officielle trækningsliste indeholdende samtlige ovenstående numre samt numrene på endnu ikke hævede præmier fra tidligere trækninger vil kunne købes for 15 øre i bladudsalgene fra den 6. oktbr. d. å. **Udbetaling af præmier af alle størrelser foregår ved finanshovedkassen, amtstuer** og endvidere uden for København ved **toldkasserne fra og med den 8. oktbr. d. å.** Af kontrolhensyn vil der for obligationer, på hvilke der er faldet præmier på 500 kr. eller større beløb, og som er indleveret til amtstuer og toldkasser, hengå nogle dage mellem obligationernes indlevering og præmiernes udbetaling. Præmier, der er faldet i denne trækning, skal være hævet inden 8. oktbr. 1962. Efter denne dato er de forældede.

Finansministeriet, den 25. september 1959.